# Børn og kemisk evni



# Evnisyvirlit


| | |
|---|---|
| Børn og kemisk evni | 2 |
| Í barnakamarinum | 4 |
| Í baðirúminum | 10 |
| Á spælilássinum | 14 |
| Barnaútgerð og klæði | 18 |
| Tá ið vaksin nýta kemikalii | 22 |
| Hvat siga merkini | 28 |
| Vilt tú vita meira | 30 |

# Børn og kemisk evni



Kemikalii verða ofta nýtt til framleiðslu av ymiskum vørum til børn, t.d. spennandi og litrík leiku, tilfar til mennandi og skapandi ítriv ella evni til barnarøkt. Børn sleppa tí ikki undan at koma í samband við kemikalii. Summi av hesum evnum kunnu vera skaðilig, og børn eru meiri viðbrekin enn vaksin fyri slíkum evnum. Í mun til vaksin kunnu børn ikki sjálvi verja seg fyri ávísum skaðiligum árini, um ella tá ið tey koma í samband við evnini. Børn frá 0 til 3 ára aldur kanna t.d. umheimin við at koyra lutir í munnin, bíta og súgva teir.

Hesin bóklingur snýr seg um børn og kemisk evni, og er serliga ætlaður foreldrum, námsfrøðingum, heilsufrøðingum og øðrum sum varða av børnum upp til 6 ára aldur. Við at fylgja tilmælunum í hesum bóklingi, kanst tú vera við til at tryggja, at børn ikki fáa skaða, tá tey koma í samband við barna- og vaksnamannavørur, sum innihalda kemisk evni.



# Í barnakamarinum

Ofta eru kemikalii ein fyritreyt fyri at framleiða litrík leiku og tilfar til ymisk mennandi og skapandi ítriv. Sjálvt um tað eru reglur á hesum øki, so er neyðugt at ansa eftir, hvat vit keypa til børn.

## CE-merking

Framleiðarin og tey, ið flyta inn leiku o.a., hava ábyrgd av at tryggja, at leiku ikki innihalda vandamikil evni í nøgdum, sum kunnu vera hættislig fyri trygd og heilsu hjá børnum. Leiku mugu heldur ikki vera skaðilig, um børn nýta tey á annan hátt, enn tey eru ætlað – t.d. við at koyra tey í munnin ella at súgva tey.

Felags ES-reglur siga, at leikur til børn yngri enn 14 ár skulu merkjast við einum CE-merki. Við CE-merkinum gera framleiðarin ella innflytarin myndugleikunum vart við, at vøran lýkur tey heilsu- og trygdarkrøv, sum eru ásett í ES-reglunum. Skulu serstøk trygdarfyrilit havast – t.d. at børn yngri enn 3 ár ikki mugu nýta leikað – skal tað standa greitt tilskilað.

Les meira um CE-merkið í partinum »Hvat siga merkini« á bls. 28.

## Dukkur og aðrar bleytar plastvørur

Bleytar plastvørur – t.d. dukkur – kunnu vera framleiddar av PVC-plasti, sum inniheldur bleytgerarar nevndar ftalat. Ftalat er undir illgruna fyri at hava heilsuskaðilig árin. Børn kunnu serliga fáa ftalat í seg, tá ið tey bíta í ella súgva leikuni.

Tilmæli



Smá børn súgva ella bíta ofta í leiku o.a. Tí eiga leikur ikki at vera úr bleytum PVC.

Tilmæli



- Kannið um lutirnir geva nikkul frá sær.
- Útgerð til nikkulroynd, fæst til keyps á apotekunum.

## Prýðislutir til børn

Mørk eru fyri, hvussu nógv nikkul, ið eitt nú prýðislutir kunnu geva frá sær uttan at elva til ovurviðkvæmi. Hóast tað aðrastaðni er bann fyri at selja vørur, ið geva nikkul frá sær, ber framvegis til at keypa slíkar vørur, t.d. prýðislutir til børn eins og til vaksin, sum kunnu elva til ovurviðkvæmi.

Lesið meira um nikkulroyndina í hesum parti á bls. 8.





- Keypið ikki leiku av bleytum PVC-plasti til børn.
- Um tit keypa leiku av PVC, veljið so tað, sum er gjørt av hørðum plasti.

## Smyrsl

Nógv børn nýta smyrsl í sambandi við sjónleik, og tá ið tey klæða seg út. Smyrsl ætlað børnum skal vera CE-merkt. Øll fríðkanarevni nú á døgum hava vanliga vørulýsing; tí ber til at sleppa undan evnum, sum barnið ikki tolir. Um ov lítið pláss er fyri eini vørulýsing á vøruni, skal vøran vera merkt við eini ímynd, sum sýnir eina opna bók og ein fingur.

Myndin merkir, at vørulýsingin annaðhvørt er hjáløgd, er á einum uppslagi nær vøruni ella kann fáast í handlinum.

Ein vøra kann, hóast hon er CE-merkt, innihalda evni, sum kunnu elva til ovurviðkvæmi, eitt nú anga ella haldevni. Tí er best at keypa smyrsl uttan anga, fyri at minka um vandan fyri at gerast ovurviðkvæm.

Lesið meiri um fingurtekstímyndina og CE-merkið í brotinum »Hvat siga merkini« á bls. 28.

## Tilmæli

- Keypið einans smyrsl, sum er CE-merkt.
- Keypið ikki smyrsl, ella onnur leiku, við anga. Tað kann elva til ovurviðkvæmi.
- Lesið vørulýsingina. Keypið ikki vørur, um tað ikki er møguligt at fáa greiðar upplýsingar.

Tað er stuttligt at klæða seg út og smyrja seg, men minnist til at velja CE-merkt smyrsl.



## Evnafrøðisett, formingarevni, máling, lím o.a.

Nógv leiku og tilfar til ítriv innihalda kemikalii – t.d. evnafrøðisett, sett til plaststoyping, keramikk, emaljering og fotosett – og er umráðandi at lesa nýtsluleiðbeiningina, upplýsingar um vandar og leiðbeining um fyrstuhjálp. Á vøruni eigur at standa hvønn aldursbólk vøran er ætlað til, og t.d. um hon bara má nýtast,meðan vaksin eru hjá. Aldursmarkið kann vera ymist – millum 3 og 12 ár. Nøkur formingarevni eru í stóran mun gjørd úr PVC. Nýtsluvegleiðing er kravd og skal siga frá, hvussu vøran skal handfarast. Ítrivsvørur sum t.d. máling, lím og tekniamboð, ið eru ætlað børnum yngri enn 14 ár, skulu eins og leiku vera CE-merkt.

## Tilmæli

- Fylgið aldursmarkinum og lesið nýtsluvegleiðingina gjølla.
- Havið umsjón við børnum, sum spæla við leiku, ið innihalda kemikalii, t.d. evnafrøðisett o.a..
- Vel vørur, sum eru merktar við ES-Blómuni, um tær eru at fáa.

## Nikkulmarkið

Í Danmark er markvirðið fyri hvussu nógv nikkul ein lutur kann geva frá sær 0,5 mikrogramm pr. $cm^2$ um vikuna fyri hesar lutir: Oyralokkar, -ringar og -pinnar, hálsprýði, armbond og -leinkjur, fótleinkjur, ringar og brillustell, reimar, spenni og bakhúsar á armbandsurum. Somu reglur eru galdandi fyri knappar, spenni, snarlás og nittur, um tey koma inn at holdinum, tá tey verða nýtt.

## Nikkulroynd

Nikkulroyndin, sum fæst til keyps á apotekinum, inniheldur tvær loysingar. Tveir dropar av hvørji loysing verða dryppaðar á ein vattpinn. Løgurin verður gníggjaður á metallutin í uml. 30 sekund. Um luturin ella vattpinnurin gerst reyður, gevur luturin ov nógv nikkul frá sær.



## Sjálvlýsandi leikur

Nakrar av teimum vælumtóktu sjálvlýsandi stjørnunum, sum kunnu límast upp á veggir, loft o.a. eru kannaðar. Tað eru eingi vandamikil evni í stjørnunum, og tær eru heldur ikki skaðiligar, tá ið tær lýsa.

Sjálvlýsandi hálsbondini, sum hava verið vanlig at fáa til keyps á stevnum, festivalum og øðrum tiltøkum eru harafturímóti vandamikil. Hálsbandið er eitt tunt plastrør við sjálvlýsandi løgi í. Løgurin inniheldur eitt nú ftalat, sum er undir illgruna fyri at hava heilsuskaðilig árin. Síðan 1997 hevur verið bannað at selja hálsbondini í Danmark.

Lesið meira um vandamerki í brotinum »Hvat siga merkini« á bls. 28.



*Allar leikur til børn yngri enn 14 ár skulu vera CE-merkt.*

## Tilmæli

- Keypið CE-merktar vørur.
- Um tað ikki ber til at keypa CE-merktar ítrivsvørur, veljið so eina vøru uttan vandamerki.
- Spyrjið eftir nýtsluvegleiðingini.

# Í baðirúminum

Vit vaska børnunum dagliga, og brúka í hesum sambandi  bæði sápu, húðrøkt o.a. Angi og haldevni í hesum røktarvørum er tann vanligasta orsøkin til ovurviðkvæmi hjá børnum, ið stendst av røktarvørum. Illgruni er um, at ávís haldevni órógva hormonjavnvágina.

## Sápa, sjampo og krem

Børn eiga ikki at verða vaskað við sápu, sjampo og kremi vi anga. Trupult er at sleppa undan haldevnum, men við at lesa vørulýsingina, kann sleppast undan at keypa vørur við haldevnum, sum barnið ikki tolir. Hesi evni kunnu t.d. geva útslett og eksem á viðbrekna húð. Føst handsápa turkar húðina meira enn flótandi sápa.

Svanamerktar vørur til barnarøkt innihalda ikki anga og evni, sum ávirka hormonjavnvágina, og avmarkar nýtslu av haldevni, sum elva til ovurviðkvæmi. Tí eru svanamerktar





og aðrar umhvørvismerktar vørur eitt gott val, tá tú skalt keypa til barnarøkt.

Tað kann vera trupult at fáa smærru børnini at spýta tannkrem út, og tí fáa tey ofta nakað í seg. Tannkrem inniheldur fluor, sum er skaðiligt í ov stórum nøgdum, og tí skal einans ein nøgd á stødd við neglina á lítlafingri hjá barninum brúkast hvørja ferð bustað verður. Eitt annað evni sum kann vera í tannkreminum er triclosan. Triclosan skaðar umhvørvið, og er undir illgruna fyri at elva til mótstøðuførar bakteriur, haraftuat verður tað mett at vera óneyðugt. Kanna vørulýsingina á tannkreminum, so tú sleppur undan triclosan.

# Tilmæli

- Nýtið ikki røktarevni við anga ella haldevnum
- Lesið vørulýsingina
- Nýtið milda, flótandi barnasápu í staðin fyri fasta handsápu
- Keypið røktarevni við tí norðurlendska umhvørvismerkinum »Svananum«

## Bítiringar og suttur

Áður vórðu nógvir bítiringar og suttur gjørdir av bleytum PVC-plasti. Orsakað av nógva kjakinum um ftalat, sum verður nýtt í PVC, eru flestu bítiringarnir nú av øðrum plast-evnum, træ ella klæði. Heldur ikki er nakar vandi við suttum. Danskar kanningar av sutt-um av merkinum Mam, Nuk og Chicco vísa, at barnið fær ikki skaðilig evni í seg við at nýta suttu.

Kortini verður mælt til at skálda suttur, áðrenn tær skulu nýtast – eisini suttur á suttu-fløskum.

## Vætulappar

Vætulappar eru sera væl umtóktir t.d. í sam-bandi við blæuskifting. Vætulappar innihalda haldevni og møguliga anga, sum kunnu geva útslett og eksem á viðkvæma húð. Eisini eru smáar nøgdir av lívrunnum loysingarevnum í vætulappum. Loysingarevnini turka húðina og gera hana viðkvæma fyri øðrum vanda-miklum evnum. Tí verður mælt til, einans at nýta vætulappar tá onki annað er at taka til.

### Tilmæli

- Keypið PVC-fríar bítiringar.
- Skáldið suttur og pattir, áðrenn tær verða nýttar.

### Tilmæli

- Nýtið ikki vætulappar við anga til børn. Nýtið vatn og milda flótandi barnasápu uttan anga, tá ið blæan skal skiftast.
- Nýtið ikki vætulappar dagliga.
- Vætulappar sum eru merktir við »Svananum« innihalda ikki anga og haldevni, sum kunnu skaða umhvørvið og heilsu.



## Blæur

Vanligar blæur innihalda ikki bleytt PVC, men gamaldags blæusnippar kunnu vera av PVC. Teir kunnu geva frá sær ftalat, so nýtið ikki teir.

Fyri bert fáum árum síðani vóru tað fleiri sløg av blæum sum høvdu krem ella salvu í sær. Men aftan á nógv kjak verða flestu blæurnar nú framleiddar uttan hesi evni.

Svanamerktar blæur eru umhvørvisliga betri enn aðrar, og tær innihalda ikki heilsuskaðilig evni .



Svanamerktar blæur eru betri fyri umvørvið.

# Tilmæli

- Keypið ikki gamaldags blæusnippar av bleyt-PVC.
- Keypið ikki blæur við krem ella anga.
- Keypið blæur við norðurlendska umhvøvis-merkinum »Svaninum«.





Eisini á spælinum skal heilsan hjá børnunum havast í huga. Tað kann eitt nú gerast við at nýta við, sum ikki er rotvardur.

# Á spæliplássinum

Um tit hava urtagarð ella tit hava ávirkan í sambandi við garðsútbúnað ella spælipláss har tit búgva ella á dagstovninum, so eru tað nøkur vandamikil evni, ið ansast skal eftir

## Steyrar

Enn verða gamlir telefonsteyrar nýttir til sandkassar og spæliamboð. Teir kunnu vera rotvardir við kreosot – ið er ein tjørulík olja – sum kann ørkymla holdið, um vit fáa tað á okkum, og hetta evni kann eisini vera krabbaelvandi.

Sjálvt um steyrarnir eru 30-40 ára gamlir, kann kreosot seta út í moldina og sandin í og uttan um sandkassan. Heitar summardagar kann væta harumframt seta úr steyrunum, sum kunnu geva frá sær guvu, sum er skaðilig at anda í seg.

Aðrastaðni er bannað at nýta kreosot-viðgjørdar steyrar á spæliplássum og á frítíðarøkjum. Nú ber tó til at fáa nýggjar steyrar av haldførum viði uttan rotviðgerð, sum kunnu halda í 5-8 ár tá teir eru í jørð.

## Tilmæli

- Kreosot-viðgjørdir steyrar eiga at verða skiftir út, t.d. um farið verður undir at umvæla garðin.
- Steyrar, sum liggja sum sitipláss við t.d. sandkassan, eiga at verða klæddir við fjalum, so teir ikki koma at holdinum.
- Sandurin eigur at verða skiftur eina ferð um árið í sandkassum av viði, sum eru viðgjørdir við arsen ella kreosot.

## Valmøguleikar til rotvardan við

Mælt verður frá at nýta rotvardan við til sandkassar, tí tey skaðiligu evnini seta út í sandin. Nýtið í staðin órotvardan kjarnavið (tað innasta av viðarbulinum) av lerk, sum kann halda 5-15 ár í jørð. Tað ber eisini til at nýta kjarnavið av Western Red Cedar (slag av reyðum sedrisviði) ella av eik, sum eru meiri haldfør enn vanligur viður.

Spæliamboð, sum hava samband við jørð – sum t.d. berandi stólpar, reiggjur, klintririmaverk, torn og onnur bygging av viði – sum skal halda longur enn 15 ár, eigur at verða framleitt av kjarnaviði av eik ella Western Red Cedar. Ein annar møguleiki er at gera betongundirstøði, so viðurin er leysur av jørðini. Rotviðgjørdur viður skal vera NTR-merktur. Merkið tryggjar, at viðurin er viðgjørdur við evnum, ið eru góðkend av danska Umhvørvisstýrinum, og harvið er fríur fyri krom og arsen.

Lesið meira um, tá ið arbeitt verður við viði í brotinum »Tá ið vaksin nýta kemikalii« á bls. 25 og um NTR-merkið í brotinum »Hvat siga merkini« á bls. 28.

## Tilmæli

- Nýtið ikki rotvardan við til sandkassan og spæliamboð oman á jørð.
- Berandi stólpar skulu kannast á hvørjum ári eitt spakadýpi niðri fyri rot og sopp. Hetta er galdandi bæði fyri órotvardar og rotvardar stólpar.
- Tað er bannað at brenna sprek av málaðum ella rotvardum viði á báli ella í brenniovni. Latið tilfarið til kommunala bingjuplássið.






Í góðum hondum tey fyrstu árini uttan PVC og nikkul.

# Barnaútgerð og klæði

Gott er at at leggja smábørn út í vognin at sova í frískari luft. Men ansið eftir vandamiklum evnum, sum kunnu vera í klæðum, innanklæðing í barnavognum og trygdarselum.

Lesið meir um nikkuroyndina í brotinum »Í barnakamarinum« á bls. 8.

## Barnavognar

Barnavognar kunnu vera klæddir innan við bleytum PVC, og harumframt kunnu tey bleytu regnsløgini til barnavognar vera av PVC. Børn hava lyndi til at súgva alt, so tað ræður um ikki at nýta nakað tilfar av bleytum PVC. Spenni og snarlás í barnavognsselum kunnu harumframt geva frá sær nikkul, sum elva til nikkulovurviðkvæmi, um tey koma inn at húðini.

## Tilmæli

- Nýtið ikki barnavognar, ið eru klæddir innan við PVC ella regnslag úr PVC.
- Kannið spenni og snarlás í barnavognsseðlunum fyri nikkul. Tað er lætt at kanna við eini nikkulroynd, sum fæst á apotekinum.

## Klæði

Klæði, handklæði, seingjarklæði o.a. kann verða viðgjørt við haldevnum, sum kunnu elva til ovurviðkvæmi. Sumt litað klædnatilfar kann harumframt innihalda evni, sum kunnu vera heilsuskaðilig. Øll klæði eiga at verða vaskað, áðrenn tey verða nýtt fyrstu ferð.

Tá regnklæði skulu keypast, keypið so regnklæði uttan PVC og ftalat. Keypið heldur ikki regnklæði, sum eru viðgjørd við PFOS. PFOS verður brúkt til at gera klæði vatntøtt, men nú verður rátt frá at brúka PFOS, tí evnið skaðar umhvørvið. Veljið heldur regnklæði av klæði, nylon (polyamid) ella av plastinum polyurethan (PU)

### Tilmæli

- Vaskið øll nýggj klæði, áðrenn tey verða nýtt. Veljið vaskievni sum er svanamerkt og uttan anga. Brúkið ikki skolievni av tí at restir av anga frá skolievninum kann sita eftir í klæðunum, og hesi kunnu elva til ovurviðkvæmi.

- Keypið klædnatilfar við ES umhvørvismerkinum »Blómuni« ella norðurlendska »Svananum«.

## Knappar, snarlás, nittur og tílíkt

Metallutir, so sum knappar, snarlás, nittur o.tíl. kunnu innihalda og geva frá sær nikkul. Tess meira nikkul luturin gevur frá sær størri gerst vandin fyri at fáa nikkulovurviðkvæmi. Hevur ein fyrst fingið nikkulovurviðkvæmi kann sjálvt tað at taka í eitt hurðarlás geva útslett.

Lesið meira um nikkulroyndina á bls. 8 og um umhvørvismerkið hjá ES, Blómuna, í brotinum »Hvat siga merkini« á bls. 29.

### Tilmæli

- Kannið metallutir fyri at vita, um teir geva frá sær nikkul. Tað er lætt at kanna við eini nikkulroynd, sum fæst á apotekinum.

Best er als ikki at nýta metallutir, ið innihalda nikkul, serliga í lutum sum snarlás o.a. í klæðum, sum koma inn at húðini.



# Tá ið vaksin nýta kemikalii

Kemikalii av ymiskum slag eru í øllum heimum. Vit hava vaskievni, máling, lím, loysingarevni, tendriolju, boni-voks, skósvertu, plantueitur og enntá rottugift. Verða hesi ikki nýtt og goymd rætt kunnu tey vera sera vandamikil.

Ofta verða ávísar reingerðar- og húsarhaldsvørur o.a. settar, har tær eru lættar at fáa hendur á – eitt nú undir køksvaskið ella í lág skáp. Vesireins og maskinuppvaskievni eru dømi um hetta. Er vøran merkt við einum brandgulum vandamerki, skal hon goymast, har børn ikki fáa fatur á henni. Hóast tað ofta er barnatryggjað lok á slíkum vørum, so er eingin vissa fyri, at børn ikki fáa lokið av.

## Tilmæli

- Goymið øll vandamerkt húsar-halds- og reingerðarevni, so tey eru óatkomandi hjá børnum, t.d. í einum læstum skápi.
- Nýtið húsarhalds- og reingerðar-evni, sum eru svanamerkt. Hesar vørur skaða umhvørvið minni enn aðrar húsarhalds- og reingerðarvørur. Eisini vørur við svanamerkinum mugu goymast, so børn ikki sleppa at teimum.
- Keypið og nýtið minst møguligt av kemiskum evnum.
- Minst til, at nøkur evni skulu burturbeinast sum vandamikið burturkast.




Børn og húsarhaldskemikalii
hóska ikki saman.
Haldið tey hvør sær.

## Lampuolja

Klárar oljulampur, sum kunnu fyllast við lampuolju, eru væl umtóktar, men hesar hava havt fleiri skaðatilburðir við sær, tí børn hava drukkið av oljuni. Børnini mistóku serliga ta litaðu oljuna fyri sodavatn. Oljan kann geva evnafrøðiligan lungnabruna, kemur hon niður í lunguni.

## Týningarevni

Vit nýta stundum týningarevni móti illgresi, soppavøkstri og skordýrum. Tað er serstakliga, tá ið skordýraeitur verður nýtt innandura, at ansast skal eftir børnum.

Tá ið loppueitur verður nýtt, er tað týdningarmikið at vaska væl og virðiliga, áðrenn viðgjørt verður. Sjálvt um sprænt verður, har djórið er, skal ikki sprænast so børn fáa eitrið beinleiðis á seg – t.d. í seingini ella sofuni.

Viðvíkjandi mýggjabitaevnum, sum av góðum grundum skulu á húðina, so er best bara at smyrja upp á barnið, har mýggjabitarnir oftast stinga, t.d. við øklarnar og onnur støð, sum vanliga eru ber. Verður húðin órógvað, skal ein gevast at nýta evnið. Um gjørligt, verji heldur børnini við mýggjabitaneti.

### Tilmæli

- Goymið tendrivesku, lampuolju o.a. har, ið børn ikki sleppa at teimum.
- Drekka børn av oljuni, mugu tey ikki spýggja, tí oljan kann koma niður í lunguni. Gevið barninum mjólk at drekka og fá tað undir læknahond beinanvegin.

### Tilmæli

- Goymið evnini, so børn ikki fáa fatur á teimum.
- Fylgið nýtsluvegleiðingini á ílatinum
- Nýtið ikki mýggjabitaevni á pinkubørn.
- Latið vera við at nýta týningarevni um tað ber til.

## Timburarbeiði

Í sambandi við timburarbeiði, sum ofta fer fram í einum kjallara ella lítlum afturlatnum rúmi – eiga bæði vaksin og børn at nýta dust-maskur fyri at verja seg fyri trædusti, tá ið arbeitt verður.

Hetta eigur serliga at verða gjørt, tá ið arbeitt verður við spónplátum, sum kunnu innihalda formalin. Helst eiga spónplátur við merkinum E15 ella P25B at verða nýttar, tí í teimum er sera lítið av formalini.



Latið ikki húshaldskemikalii standa frammi, har børn kunnu sleppa at teimum.

# Tilmæli

- Sagið og hølvið ikki innandura.
- Nýtið spónplátur við E15- ella P25B-merking.

## Máling



Sum heild eigur máling við nógvum lívrunnum loysingarevnum ikki at verða nýtt, við tað at hon gevur frá sær heilsuskaðiliga guvu. Tað er t.d. terpentin. Tað ber til at nýta vatngrundaða máling til alt málaraarbeiði bæði innan- og uttandura.

Innandura eigur máling við lívrunnum loysingarevnum ikki at verða nýtt.

Lesið meira um MAL-kotur í brotinum»Hvat siga merkini« á bls. 29.

# Tilmæli

- Nýtið vatngrundaða máling við so lágari MAL-kotu sum gjørligt, t.e. 00-1. Tess lægri MAL-kota, tess minni av lívrunnum loysingarevnum.
- Verða penslar settir á blot í glaskrukkum, tá ið máling, sum inniheldur loysingarevni hevur verið nýtt, setið so ein plastposa omanyvir og setið hann soleiðis, at børn ikki røkka at teimum og guvan ikki kemur í uppihaldsrúm.



## Bilrøktarevni

Tann, ið hevur fingið bilin botnviðgjørdan, fær ofta eina fløsku við einum reinsanarevni heim við. Nógv av teimum evnunum, sum verða nýtt at reinsa burtur rustverjuevni so sum tektyl o.tíl. innihalda petrolium og/ella loysingarevni.

Latið ikki fløskuna standa frammi, har børn kunnu sleppa at henni og kunnu drekka av henni. Sjálvt um fløskan hevur barnatryggjaðan propp, er eingin vissa fyri, at børn ikki fáa fløskuna upp.

## Bensindunkar

Bensindunkar, ið ein sjálvur fyllir á, hava hvørki vandamerki ella barnatryggjaða afturlating. Hetta eru t.d. dunkar til sláimaskinur, motorsagir o.a.

Lesið meira um vandamikil evni í viði í brotinum »Á spæliplássinum« á bls. 15 og um vandamerking í brotinum »Hvat siga merkini« á bls. 28.

### Tilmæli

- Lesið leiðbeiningarnar á bilrøktarevnum og fylgið teimum gjølla
- Goymið evnini, so børn ikki sleppa at teimum.

### Tilmæli

- Setið bensindunkar og aðrar olju- og kemikalia-vørur, so børn ikki sleppa at teimum ella fáa guvu í seg, meðan arbeitt verður.

# Hvat siga merkini?

## Andrasarkrossurin

sigur, at vøran kann geva fleiri heilsuskaðilig árin. Undir krossinum stendur annaðhvørt heilsuskaðilig ella ørkymlandi.



## Etjingarímyndin

sigur, at vøran kann geva etjingarskaðar við nýtslu.

Er eitt nú at finna á nøkrum maskinuppvaskievnum, kálkloysarum og á evnum til at opa frárensl við.



## NTR

– merkið við eini bókstavkotu ella viðarslag – t.d. NTR/gran sigur, at viðurin er rotvardur við evnum, sum eru góðkend av danska Umhvørvisstýrinum og harvið ikki inniheldur krom og arsen. Eisini veitir merkið trygd fyri, at rotverjan fylgir europeiskum standardum.

NTR | A

NTR | B

NTR | AB

NTR | Gran

## E15 og P25B

– heitið sigur, at spónplátur, sum eru góðkendar til bygging, húsbúnað og innbúgv, hava eitt sera lágt formalin innihald.

E15
P25B

## Fingurtekstímyndin

er á fríðkanarvørum, har innpakkingin er ov lítil til at innihalda lógarásettu vørulýsingina. Ímyndin sigur, at vørulýsingin er hjáløgd ella kann fáast á einum stakum seðli.



## CE-merkið

er á nógvum ymsum vørum. Skal eitt nú setast á allar leikuvørur, ið eru ætlaðar børnum í aldrinum 0-14 ár. Merkið er framleiðarans/innflytarans háttur at kunna um, at vøran lýkur tey heilsu- og trygdarkrøv, sum eru í leikareglunum.

CE

## MAL-kota

verður serliga nýtt í sambandi við máling, og hon er samansett av tveimum tølum við eini bindistriku ímillum. Tess hægri tal, tess størri vandi. Talið framman fyri bindistrikuna sigur, hvussu vandamikil guvan frá vøruni er. Stigin gongur frá 00 til 5. Til vanliga innandura privata nýtslu er ikki ráðiligt at nýta vørur við MAL-kotu hægri enn 2. Talið eftir bindistrikuna sigur, hvussu skaðilig vøran er, um hon kemur á húðina, í eyguni ella ein fær tað niður í seg. Stigin gongur frá 1 til 6. Vørur við MAL-kotu hægri enn 3 er til yrkisliga nýtslu og verður frárádd privatum at nýta.

Sikkerhedsregler
00-1 1993

Sikkerhedsregler
02-1 1993

## Norðurlendska umhvørvismerkið »Svanurin«

sigur, at vøran umhvørvisliga er millum tær bestu á marknaðinum. »Svanurin« er eitt umhvørvismerki, sum er undir almennum eftirliti.

## ES umhvørvismerkið »Blóman«

sigur, at vøran umhvørvisliga er millum tær bestu á marknaðinum. Merkið hevur verið til síðan 1992.



# Vilt tú vita meira

Fleiri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Umhvørvisstovuna ella at lesa tilfar sum er tøkt á alnótini:

Umhvørvisstovan www.us.fo
Barnatænastan www.naerverk.fo

Miljøstyrelsen www.mst.dk
Sundhedsstyrelsen www.sst.dk
Forbrugerstyrelsen www.fs.dk
Forbrugerrådet www.fbr.dk
Blaðið TÆNK www.taenk.dk

Norska Statens Forurensningstilsyn
www.sft.no
Svenska Naturvårdsverket
www.naturvardsverket.se

Blóman og Svanin
www.ecolabel.dk



Ritið byggir á danska faldaran »Kemi i børns hverdag«, sum er útgivin av Miljøstyrelsen og partar av donsku »TÆNK – Guide til sikre og sunde småbørn« sum blaðið »Tænk« hjá danska »Forbrugerrådet« hevur givið út.

Uppseting: Vasti
Prent: Føroyaprent
ISBN: 978-99918-3-252-4

Loyvt er at endurgeva um
víst verður til kelduna.

Faldarin er prentaður á
umhvørvisvinarligt pappír

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
541 705

**Útgivið hevur:**
Umhvørvisstovan
Traðagøta 38
165 Argir

Tlf. 342400 · Fax 342401
www.us.fo · us@us.fo